# Gullið má bíða



Rani Nolsøe mátti óvæntað lúta fyri Bernhard Thomsen á øðrum borði hjá Klaksvíkingum
Mynd: Álvur Haraldsen



John Rødgaard og Vestmenningar gjørdu sær rættiliga dælt, tá teir vunnu tryggan sigur á Havnini, og harvið komu ájavnt Klaksvíkini
Mynd: Álvur Haraldsen

**Alt gekk upp í eina hægri eind hjá vestmenningum leygardagin. Teir vunnu á havnarmonnum og klaksvíkingar taptu sera óvæntað teirra dyst móti kollfirðingum. Javnstøða er, og umdystur má til**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Eysturskúlaaulan varð karmur um seinasta umfar í FM-liðkappingini. Allir dystirnir í teimum trimum deildunum blivu leiktir undir sama takið, og gevur hetta ein serligan dám yvir leikin.

Í 1. deild var at kalla eingin spenningur undan hesum seinasta umfari. Klaksvíkingar hittu nevnliga kollfirðingar, sum ikki hava víst nógv í ár, meðan vestmenningar hittu føroyameistarnar frá í fjør, Havnar Telvingarfelag. Klaksvíkingar høvdu eina leiðslu uppá hálvtannað stig niður til vestmenningar, meðan havnarmenn vóru trý stig aftanfyri oddaliðið.

Men spenningur kom kortini í leikin.

### Finnbjørn royndi

Sum tímarnir gingu kom meira og meira fjøltur á klaksvíkingar. Vestmenningar høvdu nevnliga eina 2-0 leiðslu ímoti havnarmonnum, og ikki tyktist tað sum um havnarmenn fóru at fáa meir enn eitt stig burturúr dysti teirra. Klaksvíkingar kundu sjálvir avgera FM-heitið, við t.d einum 2-2 úrslitið, men tveir skjótir javnleikir, og tvær ivasamar støður á borðunum boðaði ikki frá góðum, sæð við klaksvíkseygum.

Endin var at vestmenningar vunnu teirra dyst heldur óvæntað 3-1 móti havnarmonnum, og støðan í hinum dystinum var 2-1 til kollfirðingar. Talvið á fjórða borði millum klaksvíkingin Finnbjørn Vang og Alvin Joensen varð tí avgerandi. Vann Finnbjørn, vann KTF FM-heitið. Javnleikur hevði viðført umdyst millum KTF og VT, meðan VT vann FM-heitið um Alvin vann. Rundan um talvið stúgvaðist telvarar og áskoðarar seg. Dúgliga bleiv kjakast í bakgrundini um Finnbjørn kanska hevði vinnandi støðu ella ei, serliga vildu klaksvíkingar vera við hesum fyrra, men samstundis hevði Finnbjørn bert 2-3 minuttir eftir til at avgera talvið í, meðan Alvin hevði um 20 min. Riddaraendatalvið tyktist fløkjasligt og óklárt, og tí gjørdi Finnbjørn helst tað rætta við at ongan kjans taka, og avviklaði tískil støðuna til teoretiskan javnleik, sum viðførir umdyst. Eitt drama, sum neyvan fyrr hevur verið at sæð í FM-liðkappingum.

Klaksvíkingar taptu óvæntað og vestmenningar vunnu óvæntaðan stórsigur, og úrslitið gevur tí ein enn meira óvæntaðan umdyst, sum verður leiktur komandi leygardag í Havnini.

### Bernhard Thomsen bjargaði vestmenningum

Hjá klaksvíkingum leiktu Ólavur Simonsen, Tummas M. Anthoniussen og, sum sagt, Finnbjørn Vang remis móti ávíkavist Hans K. Simonsen, Eyðálvi Johannesen og Alvini Joensen. Stóra hetjan á kollfjarðaliðnum varð Bernhard Thomsen, sum vann á Rana Nolsøe. Tummas Martin fekk heili níggju stig av tíggju møguligum, sum er uttan iva besta skora í 1. deild.

Vestmenningar telvaðu væl, og vunnu uppibornan sigur á havnarmonnum. IM John Rødgaard og John Jacobsen vunnu á ávíkavist Carl Eli N. Samuelsen og Olaf Berg. Javnleikirnir vóru sera áhugaverdir. Martin Poulsen hevði lovandi støðu, men Torbjørn Thomsen vardi væl, meðan Herluf og Kári Durhuus telvaðu eitt vilt talv, har Herluf valdi at taka ævigt skák í óklárari støðu.

Triði dysturin í 1. deild varð millum hvalvíkingar og HT 2. Hvalvíkingar vunnu 3-1 og tóku teir seg tí innaftur á kollfirðingar á fjórða plássinum.

### Mistøk skulu rættast

Klaksvíkingar iðraðu seg tá teir vendu leiðina norður aftur til Klaksvíkar leygarkvøldið, og væl skilur man teir. Gjøgnum alla kappingina hava teir havt leiðsluna, men snávaði í avgerandi dystinum. Úr Klaksvík verður sagt, at teir høvdu kortini eitt gott kvøld, har teir enntá hugdu at talvunum sum leikt vórðu, og hetta ber brá um at teir eru uppsettir uppá at rætta feilirnar í umdystinum komandi leygardag.

Vestmenningar vórðu sjálvsagt fegnir um at kollfirðingar leiktu somikið væl móti klaksvíkingum, og at teir vundur burturúr havnarmonnum. Havnarmenn eru als ikki nøgdir við triða plássi, og ætla tí at venda sterkt aftur komandi kappingarár. Kollfirðingar og hvalvíkingar komu væl við ímóti endanum, men eru valla nøgdir við teirra avrik.

### Toftir upp

Í 2. deild bleiv greitt at toftamenn leika í 1. deild komandi kappingarár. Teir vunnu 3-1 á runavíkingum, sum kortini kunna vera nøgdir við teirra triðja pláss. Sandavágsmenn vórðu ov stuttir, og muga taka til takkar við øðrum plássi.

Vestmenningar bjargaðu sær undan niðurflyting tá teir vunnu 3-1 á gøtumonnum. Gøtumenn muga tí tungu leiðina niður í 2. deild, men við sama liði komandi kappingarár, hava teir allar møguleikar at endurvinna plássið í 2. deild aftur.

HT 3 vann suvirent 3. deild framanfyri HT 4 og ST. Havnin fer tískil at hava tvey lið í 2. deild komandi kappingarár, eftirsum HT2 flytur niður úr 1. deild, og HT3 vann 3. deild.

### Rokan í fjørðini

Sunnudagin, dagin eftir seinasta umfar í liðkappingini, varð stór ungdóms- og barnakapping hildin í somuleiðis Eysturskúlaauluni. Ikki færri enn 45 lið, við 4-6 leikarum á hvørjum liði, høvdu teknað seg. Hetta gav eitt tal áljóðandi umleið 210 børn (!). Á Oyrarbakka fyri tveimum vikum síðani, var talið 135 børn. At kappingin á hesum sinni varð leikt í Havn hevur sjálvsagt sínar orsøkir til vaksandi talið, men áhugin fyri talvi millum ung her á landi tykist at vaksa dag um dag, og er tað sera gleðiligt.

At hava skil á yvir 200 børnum er ikki nøkur løtt uppgáva, men gott samanspæl millum tey eldru umboðsfólkini, foreldur og hjálparar o.a. gjørdi uppgáva léttari. Men ikki slepst undan at nevna at sera nógv rokan var í fjørðuni í Eysturskúlanum sunnudagin seinnapart. Stuttligt var at síggja eldhugan í eygunum hjá teimum yngri tá eitt mát nærkaðist, og hinvegin at síggja skuffilsi tá tap er í eygsjón og kongurin má leggjast. Góður og hugnaligur stemningur var millum børnini, og glað vórðu tey sanniliga tá heit pizzastykkir og sodavatn varð at fáa ókeypis í steðginum.

Skúlaflokkar úr 10. flokki og niður til 5. flokk kappaðust sínamillum, meðan børn úr 1-4. flokki kappaðust sínamillum. Talið av gentum sum luttaka er vaksið síðani Oyrarbakka-kappingina.

Hjá teimum eldru vann HT1, framanfyri KTF1. Triða plássið fekk lið úr Gøtu. Hjá teimum yngru vunnu klaksvíkingar, eins og teir gjørdu á Oyrarbakka, meðan lið úr havnini og Miðvági komu næstir í røðini.

Tann triða ungdóms- og barnakappingin verður í Gøtu leygardagin 16. mars. Tekning er við at venda sær til Gøtu Talvfelag (Reinhold Isaksen). Sí eisini www.faroechess.com um upplýsingar um komandi kapping.



# Munurin minkaði eitt lítið sindur

**Bæði Todi Jónsson og Christian Høgni Jacobsen vóru við frá fyrsta bríksli, tá bólturin aftur fór á rull í bestu donsku deildini**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Veturin hevur rættuliga havt fastatøkur í Danmark seinastu vikurnar. Tí var tað ivasamt, um tað fór at bera til at spæla fótbólt sunnudagin, tá fyrsta umfarið eftir vetrarsteðgin var á skránni í superliguni.

Í Gladsaxe, har AB skuldi hava vitjan av FC Midtjylland, bar ikki til at spæla. Og tað bar heldur ikki til at spæla í Silkeborg, har Esbjerg skuldi vitja.

Grannauppgerðin millum Viborg og AaB var ikki á skránni fyrrenn í gjárkvøldið. Tí vóru bara tríggir dystir spælidr sunnudagin, og í tveimum av teimum var ein føroyskur álopsspælari millum teir fyrstu 22 á vøllinum. Todi Jónsson var í FCK álopinum og Christian Høgni Jacobsen var í álopinum hjá Vejle.

### Málríkt fyrra umfar

Tað eru bara nakrar vikur síðani, at Christian Høgni Jacobsen flutti úr Esbjerg og til Vejle. Umframt føroyska álopsspælaran hava eisini fleiri aðrar broytingar verið í Vejle í vetrarsteðginum. Ein av hesum hevur verið, at venjarin er skiftur út. Keld Bordinggaard er farin úr starvinum. Hann skal eftir HM kappingina loysa Michael Laudrup av sum hjálparvenjari hjá Morten Olsen og danska landsliðnum.

Nýggi venjarin í Vejle eitur Frank Petersen. Frammanundan at hann kom til Vejle, hevði hann verið venjari í eitt nú Randers Freje, sum hann lyfti upp í 1. deild í 1999, og í Silkeborg, sum hann vann bronsukrónurnar við í 1995. Síðani 2000 hevur Frank Petersen verið hjálparvenjari í Vejle, og nú hevur hann høvuðsábyrgdina.

Tað var nýggi venjarin, sum fyri einum mánað síðani helt, at tað var ráðiligt at skriva sáttmála við Christian Høgna Jacobsen, tá hesin hevði royndarvant í Vejle í tvær vikur.

Christian Høgni spældi fyrsta tíman sunnudagin. So varð hann skiftur út við Mads Beierholm, sum er ein tann yngsti – helst tann yngsti – spælarin nakrantíð í superliguni. Hann er føddur 15. november í 1984, og tað var 28. ferðin, at hann spældi í superliguni, tá hann síðsta hálva tíman loysti Christian Høgna Jacobsen av.

Fyri ein álopsspælara er tað sera týdningarmikið at skora mál. Vejle vann 5-2 á Lyngby. Christian Høgni skoraði ikki, og tað iðrar hann seg sjálvandi um, tí Lyngby verður mett at vera veikasta liðið í superliguni. Teir hava í vetrarsteðginum ist meiri enn eitt fótbóltslið.

Lyngby skoraði til 1-0, tá bara 40 sekund vóru farin. Vejle svaraði aftur á hálva tímanum, og í steðginum vóru teir frammanfyri 3-2. Tað kavaði mesta partin av tíðini. Vøllurin var vánaligur, og frammanundan var tað rættuliga ivasamt, um tað var ráðiligt at spæla.

### Todi einsamallur

Undan sunnudegnum hevði fyri FCK alt annað enn trý stig í Parkini ímóti AGF verið eitt vónbrot. Dysturin endaði málleysur, og tað vóru teir í FCK ikki heilt illa nøgdir við. Orsøkin var tann, at FCK í 87 minuttir bara spældi við tíggju monnum. Svenski høgi bakkurin, Tomas Antonelius, sum fyri bara tveimum vikum síðani kom úr Coventry og til FCK, sá eftir knapt tríggjar minuttir reytt. Dómarin metti, at taklingin var alt ov ógvuslig.

Frá fyrsta bríksli var Todi Jónsson í álopinum saman við Peter Møller. Eftir útvísingina umskipaðu teir í FCK, og tá ein rúmur hálvur tími var farin, varð Peter Møller skiftur út. Miðvøllurin varð styktur og harvið var Todi leingi einsamallur í álopinum. Undan útskiftingini høvdu onkrar ábendingar verið um, at samstarvið millum Peter Møller og Toda Jónsson ikki var so galið.

Í síðstu viku roknaði Todi ikki við, at hann fór at vera førur fyri at spæla meiri enn ein tíma, men svenski FCK venjarin, Hans Backe, tykist hava stórt álit á føroyska álopsspælaranum. Tað var ikki fyrrenn, at tað restaðu tíggju minuttir, at georgiski Mikheil Ashvetia avloysti Toda Jónsson.

### Stórt undirhald

Síðsti dysturin var í Odense, har Brøndby, sum á fremsta plássinum hevur verið tíggju stig frammanfyri FCK á øðrum plássi, vitjaði OB. Talan var um ógvuliga stórt undirhald. Fyri undirhaldsvirðið hevði tað nógv at siga, at heimaliðið var frammanfyri 2-0, tá fyrra umfarið bara var átta minuttir gamalt. Flata Brøndby verjan var sum ein opnahjallur, tá OB hótti í borðunum. OB økti til 3-0 undan steðginum.

So setti Brøndby turbona frá. Teir javnaðu til 3-3, tá tað restaði eitt korter, og so varð roknað við, at Brøndby í hvussu so er fór at fáa eitt stig. Men myrki Andrew Tempo, sum frammanundan hevði skorað eitt mál, vildi tað øðrvísi. Úr brotsteigar samankomingini í vinstu smekkaði hann til og bólturin sigldi í netið dygst undir tvørtrænum í handara borðinum. Eitt framúr vakurt mál, sum teir í FCK sjálvsagt eisini vóru fegnir um. At Brøndby tapti hevði við sær, at munurin frá teimum og til FCK minkaði til níggju stig.

Komandi sunnudag fer FCK til Vejle. Dysturin millum liðið hjá Toda Jónsson og liðið hjá Christian Høgna Jacobsen verður sendur beinleiðis á TV3+ rásini. Og so mugu vit vóna, at teir báðir føroysku spælararnir varðveita sessirnar, sum teir sunnudagin høvdu millum teir fyrst 22 á vøllinum.

# Sumbingar halda fram

**Tað er ikki greitt, nær teir báðir útsettu dystirnir í Fuglafirði og á Sandi verða spældir**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Sumbingar spældu seg um vikuskiftið víðari í kappingini um løgmanssteypið. Men tað var ikki púra uttan trupulleikar, at teir vunnu á Fram. Gestirnir úr Havnini komu á odda, tá eitt korter var farið. Steingrímur Mikkelsen skoraði hjá Heina Jacobsen í Sumba málinum.

Ikki fyrr enn seinna umfarið var knappar tíggju minuttir gamalt javnaði Nebosja Veljkovic. Sigursmálið kom, tá tað bara restaðu tríggir minuttir. Bjørn Thorsteinsson, sum seinastu árini hevur spælt við B71, sendi framvið Kristini Jensen í Fram málinum.

Sambært skránni skuldu tveir aðrir dystir havt verið spældir. Men bæði á Sandi, har LÍF skuldi havt vitjað, og í Fuglafirði, har AB skuldi havt spælt, verður sagt, at har var so mikið av kava, at tað ikki bar til at spæla fótbólt.

Á FSF-skrivstovuni vistu tey í gjár ikki at siga, nær útsettu dystirnir skulu spælast. Tað er týdningarmikið at avgreiða teir sum skjótast, tí annars kann brøkur so skjótt koma í bólkaspælið. Komandi vikuskiftið skulu sambært skránni Sumba og vinnarin av B71-LÍF spæla, og FS Vágar skal spæla ímóti vinnaranum av ÍF-AB.

Annað vikuskiftið verður farið undir bólkaspælið, og tá skulu vinnararnir av dystunum, sum eru ásettir at vera komandi vikuskifti, spæla í bólki 1 og bólki 2.

**Sumba-Fram 2-1 (0-1)**
0-1: Steingrímur Mikkelsen 15
1-1: Nebosja Veljkovic 54.
2-1: Bjørn Thorsteinsson 87.

# Hjalgrím, Sonni og Marcello fleiri mál

**Liðini í bestu deildini spældu fleiri venjingardystir í Eysturoy um vikuskiftið**

VENJINGARDYSTIR
*Jóannes Hansen*

Fleiri av bestu fótbóltsliðunum í landinum vóru sunnudagin á vøllunum í Estyroy. B68 og HB spældu á Svangaskarði, og á Eiði spældu EB/Streymur og NSÍ og ÍF og KÍ. Eitt sindur undarligt tykist tað, at fuglfirðingar høvdu møguleika at spæla venjingardyst, tá hugsað verður um, at innleiðandi dysturin í kappingini um løgmanssteypið, sum teir skuldu havt spælt ímóti B71, var útsettur. Hann kundi eins væl havt verið spældur á Eiði sum venjingardysturin ímóti KÍ.

Sambært fyribils skránni fyri landskappingina, sum varð býtt út á FSF aðalfundinum, skulu B68 og HB spæla á Svangaskarði í fyrsta umfarinum. Einki er at ivast í, at Frank Skytte og hansara menn einki høvdu havt ímóti einari endurtøku av úrslitinum, sum var leygardagin. B68 vann 3-0, eftir at teir í steðginum høvdu verið frammanfyri 1-0.

Marcello Marcellino hevði eitt vánaligt kappingarár í fjør. Sunnudagin vóru ábendingar um, at brasiliumaðurin ætlar sær at vera eins væl upplagdur í ár, sum hann var í fyrraárið. Hann skoraði tvey tey fyrstu málini, og hann legði upp til síðsa málið, sum Fróði Benjaminsen skoraði.

Sum vit hava skilt tað, so vóru bæði liðini næstan fullmannað. Hjá B68 restaði Arnhold Joensen, sum er skaddur, og hjá HB var Jón Rói Jacobsen ikki við.

### Hjalgrím tríggjar ferðir

KÍ og ÍF spældu á Mølini á Eiði. Í steðginum var málleyst, men í 2. hálvleiki gjørdist munurin meiri eyðsýndur. KÍ vann 4-1, og tað vóru tevir unglingaspælarar, sum skoraði øll málini.

Hjalgrím Elttør spældi við í seytjan landskappingardystum í 1. deild í fjør, men honum eydnaðist ongantíð at skora. Sunnudagin vóru ábendingar um, at málturkurin í bestu deildini er um at vera av hjá unga manninum. Hjalgrím Elttør skoraði trý mál, og ein annar unglingaspælari, Atli Danielsen, skoraði eitt mál fyri KÍ.

Hjá KÍ eru fleiri spælarar skaddir. Millum hesir eru venjarin, Kurt Mørkøre, Allan Mørkøre, Ove Nysted og Alexander Djordjevic. Millum spælararnar á KÍ liðnum var Grímur Vang, sum áðrenn hann fór út at sigla var drúgvur í HB verjuni. Nú býr hann í Klaksvík. Tveir Lakjumenn, sum ikki spældu við KÍ í fjør, vóru við ímóti ÍF. Teir vóru Heðin á Lakjuni, sum spældi við B36 í fjør, og so Bárður á Lakjuni, sum altíð hevur spælt við ÍF.

### Sonni tríggjar ferðir

A kavaleysu Mølini spældu eisini heimaliðið og NSÍ. Sambært NSÍ venjaranum, Jógvan Martin Olsen, so gekk tað væl hjá hansara monnum fyrsta hálva tíman. NSÍ vann 3-1, eftir at teir í steðginum høvdu verið frammanfyri 2-0.

Sonni L. Petersen skoraði øll trý málini hjá NSÍ. Tá EB/Streymur minkaði um munin, var tað fyrrverandi U-17 landsliðsmaðurin Hans Pauli Samuelsen, sum skoraði. Hann var ongantíð á besta liðnum hjá EB/Streymi í fjør.

Í kvøld fara HB og NSÍ at spæla venjingardyst í Gundadali. Ætlanin var, at dysturin millum HB og B68 skuldi vera í Gundadali sunnudagin, men tá var so mikið av kava í Gundadali, at avrátt varð at flyta inn á Svangaskarð.

Komandi vikuskifti verður Klaksvíkskappingin. Leygardagin verða dystirnir GÍ-B36 og KÍ-HB. Sunnudagin verður fyst spælt um triðja og síðani um fyrsta plássið.